# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um myelomatosu

## Sjúkueyðkenni, ið vekja illgruna um myelomatosu

Sjúkueyðkenni/blóðroyndarsvar, ið skulu vekja illgruna um myelomatosu

- Pína í beinagrind, íroknað drúgv ella trupul at viðgera ryggjapína uttan aðra orsøk
- Øktur títtleiki av brunum
- Skúmandi land
- Sjúkueyðkenni tengd at hypercalcæmi (konfusion, dehydratio, obstipatión)

- Anæmi
- Ávirkað nýrafunktión
- Proteinuri
- Hypercalcæmi
- Hækkaður M-komponentur
- Abnormt lutfall av fríum løttum ketum í serum
- Hypogammaglobulinæmi

Um ivamál er um biokemisku kanningarúrslit kann konfererast við hæmatologisku deild á Ríkissjúkrahúsinum.
Við týðandi hypercalcæmi, ringari nýrasvíkjan ella tekin til medullært tvørsnit, skal sjúklingurin innleggjast akutt

GG! Hæmatologi verður røkt av donskum serlæknum, tí er frægast, at aktuelt í ávísingini í Cosmic
verður skrivað á donskum.

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "hæmatologi - illgruni um myelomatosu" undir móttakandi eindini
"Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so
útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026